gult22 cyan22 magenta22 svart22



Føroyar - Orkney 3-0 (25-7, 25-9, 25-17)

# Stórsigur til Føroyar



*Manslandsliðið vann trygt í fyrsta dystinum á Oyggjaleikunum*

**Manslandsliðið í flogbólti legði fyri við greiðum sigri á Orkney, sum snøgt sagt varð hølvað av**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Tað líktist eini yvirkomuligari uppgávu hjá manslandsliðnum, tá teir í fyrsta dystinum skuldu hitta Orkney-oyggjarnar.

Hetta kundi eisini ásannast, tá dysturin var lokin. Føroyar vunnu ein sera tryggan 3-0 sigur, har vandi ongan tíð var fyri, at okkara menn fóru at missa nakað sett.

## Klassamunur

Longu frá fyrsta bríksli varð lagt hart út. Orkney búgvar fingu ikki eitt bein til jørðina, og tey sjey stigini, sum teir fingu, eru helst eisini ein góð ímynd av teirra leikluti í dystinum.

Í næsta settinum var støðan á leið hin sama, og hóast føroyingar nýttu allar skiftisleikarar í triðja settinum, so var heldur einki ivamál í hesum. Føroyar fingu ta byrjan, sum leikarar og venjarar høvdu ynskt, og so var klárt at fara í holt við Cayman-oyggjarnar seinni sama kvøldið.

Føroyar-Cayman 3-0 (25-7, 25-20, 25-14):

# Byrjaðu trygt

**Føroysku gullkvinnurnar í flogbólti høvdu ikki nakrar stórvegis trupulleikar í fyrsta dystinum á Oyggjaleikunum**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*



Gullvinnararnir í kvinnuflogbólti, Føroyar, løgdu fyri í flogbóltskappingini á Oyggjaleikunum, og hóast talan ikki var um sterkasta mótstøðuliðið í kappingini, so tykjast okkara kvinnur á ongan hátt at vera verri fyri, enn tær vóru fyri tveimum árum síðani.

## Allar sluppu á vøllin

Serstakliga fyrsta sett var ein sonn styrkisuppvísing frá føroyskari síðu, har caymansku genturnar ikki fingu eitt bein til jørðina.

Til seinna settið hevði venjarin, Niclas Joensen, skift nakað av fólki út, og hetta viðførdi eisini, at rútman í føroyska spælinum als ikki gjørdist hin sama. Cayman fylgdi eisini væl við, og stríddi seg nærum upp á javnt, men eftir eitt føroyskt time-out kom betri skil á.

Triðja settið tóktist eina mest at vera ein avgreiðsluspurningur, og uttan stórvegis hóvasták varð hetta eisini tryggjað.

## Nógv positiv

At byrja við einum sigri er sjálvandi altíð ein góð byrjan, men umframt stigini fyri dystin, var talan um fleiri positivar lutir fyri føroysku kvinnurnar.

Talan var um ein rættiliga ómaksleysan sigur, sum ikki kostaði nakað serliga nógva orku, og umframt kropsligu sparingarnar í so máta, kann ein slíkur helst eisini virka til at økja um sinniliga yvirskotið, sum er so týdningarmikið í slíkum kappingum.

*Talan varð ongan tíð um nakran veruloigan dysti millum Føroyar og Cayman hjá kvinnunum*

Eisini hevur tað nógv at siga, at allar kvinnurnar fingu høvi at royna seg, so tær longu nú kenna á sær, at tær eru ein partur av liðnum. Nakað sum ivaleyst eisini kann styrkja um samanhaldið og –tvinnanina á liðnum, og tískil í minni mun ger liðið viðbrekið fyri skaðum og øðrum óhappum.

Annars var hugaligt t staðfesta, at fleiri av føroysku leikarunum tóktust vera sera væl fyri longu nú. Marjun Kalsø er framvegis trygg sum hevari, meðan serliga Gudrid Nolsøe hevði nøkur knallhørð smash tvørtur um, og verður hetta leisturin hjá liðnum framyvir, so er als ikki óhugsandi, at liðið aftur fer at gera rættiliga vart við seg komandi vikuna.

Næsti dysturin hjá Føroyum varð leiktur eftir at blaðið fór til prentingar mánadagin, og var tað tá grønlendska landsliðið, sum stóð á skránni.

# Spældu rætt

**Hjálparvenjarin hjá flogbóltskvinnunum tóktist væl nøgdur um byrjanina, sum føroysku kvinnurnar fingu**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Føroyska kvinnulandsliðið fekk eina flúgvandi byrjan við sigrinum á Cayman, og eftir dystin var tað eisini ein væl nøgdur hjálparvenjari, sum Sosialurin hitti uttan fyri flogbóltshøllina á Mount Murray.

## Ivaðust um styrkina

Jákup av Kák segði annars, at tey vóru eitt sindur í iva um, hvussu væl fyri genturnar av Cayman fóru at verða til hesar leikirnar.

- Í so máta var talan um eina sindur trupla byrjan hjá okkum, tí vit vistu sera lítið um styrkina hjá teimum. Tað kundi væl verið, at tær høvdu ment seg heilt nógv síðani tá, og serstakliga høvdu tær støddina við sær, men vit stóðu væl á vøllinum, og dekkaðu tær sum vit skuldu, so talan gjørdist um ein tryggan sigur, segði hjálparvenjarin, sum annars eisini frøddist um, at allar genturnar longu nú hava havt møguleikan at royna seg.

## Helga bíðar

Einasta kvinnan, sum enn ikki hevur roynt seg á leikunum, er ársins leikari i Føroyum, Helga Nordendal.

Hon hevur undan leikunum drigist við skaða, og hóast hon enn er ivasom, so tykjast útlitini hjá henni tó at vera hampuliga góð, heldur Jákup av Kák.

- Vit valdu so at spara hana til hendan dystin, men tá teir hørðu dystirnir fara at koma, ætla vit so spakuliga at gera nýtslu av henni, og vita, hvussu nógv hon orkar. Fysioterapeutrin hjá okkum arbeiðir eisini við henni alla tíðina, so eg rokni við, at hon kemur á vøllin ein av komandi døgunum, sigur Jákup at enda.

*- Vit vistu sera lítið um styrkina hjá Cayman, segði Jákup av Kák millum annað eftir fyrsta dystin hjá flogbóltskvinnunum*




gult23 cyan23 magenta23 svart23



Føroyar-Cayman Islands 3-1 (25-16, 18-25, 25-21, 25-20):

# Sannur gysari hjá monnunum



*Í longum løtum av dystunum tóktist føroyska spælið sera afturhaldandi, og ikki minst var tað blokkurin, sum ikki fekst at rigga*

**Menninir hava nú annað beinið í hálvfinaluni, men talan gjørdist um ein sera harðan dyst, áðrenn sigurin á Cayman varð tryggjaður**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Føroyska manslandsliðið hevði eina harða skrá fyrsta kappingardagin á Oyggjaleikunum. Eftir at hava spælt móti Orkney fyrrapartin, beyð kvøldið upp á dyst móti Cayman Islands. Ein dystur, sum helst skuldi vinnast, um Føroyar skuldu hava møguleika at vinna seg fram til hálvfinalurnar.

Talan gjørdist eisini um ein sigur, men menninir máttu stríðast leingi, áðrenn hetta gjørdist veruleiki, tí teir av Cayman-oyggjunum gjørdu óvæntað harða mótstøðu.

Fyrsta settið var annars lítið, sum bendi á, at talan skuldi gerast um nakran torføran dyst. Gaman í byrjaðu hinir væl, men eftir at okkara vunnu fleiri bóltar á rað, kom hetta settið ongan tíð í vanda.

Í seinna fóru hinir tó at gera mótstøðu. Ikki bert á vøllinum, tí við betraða spælinum batnaði lagið á áskoðaraplássunum eisini. Treystu føroysku áskoðararnir, sum hetta kvøldið vóru heilt nógvir í tali, gjørdu sjálvandi sítt, men hóast fáment, so megnaðu tey av Cayman so avgjørt at breiða sínar calypso-rútmur út um høllina.

Føroyska spælið koyrdi nú heldur einki serligt hetta settið. Ofta var líkt til, at okkara høvdu alstórar trupulleikar av rástyrkini hjá mótstøðuni, tá hesir hevði seg langt upp av gólvinum og dundursmashaðu bóltarnar yvir á føroysku hálvuna, og aloftast í gólvið.

Føroyingar vóru tó leingi væl við, men settið bar alt meira brá av einum tapi, og so gjørdist eisini.

## Reistust aftur

Tað sum serliga tóktist vera trupulleikin hjá okkara monnum, var, at so at siga einki trýst varð lagt á mótstøðuliðið. Blokkurin vann snøgt sagt einki, og í álopspartinum var sjáldan lagt nakað serligt fyri, og tí var lag á manni hjá dimmu mótstøðumonnunum at spæla seg fram til góðar støður.

Hetta vendi spakuliga í triðja settinum. Í løtum kom veruligt glið á spælið hjá okkara, og tá teir av Cayman ikki vóru eins væl fyri tekniskt, gekk væl at seta trýst á, tá hetta veruliga varð roynt.

Hetta hendi tó alt ov sjáldan. Einamest kom tað fyri, tá Rúni Weihe slapp upp í part í spælinum framman fyri netið, meðan fleiri av berandi kreftunum als ikki sýndu ta spæl, sum teir vanliga kunnu gera í hesum partinum. Var tað ikki fyri júst Rúna, so kundi væl verið, at nógv verri hevði staðiði til hjá okkum, tí í fleiri avgerandi løtum var tað júst hann, sum við smashum sínum syrgdi fyri, at føroyska liðið yvirhøvur var við í dystinum.

## Sjúkan helt fram

Ein kundi kanska hildið, at sigurin í triðja settinum gjørdi sítt til, at verulig gongd aftur fekst á, men so var tó ikki. Sjúkan í føroyska spælinum tóktist at halda fram, og tað var heilt skjótt, at Føroyar aftur vóru aftanfyri.

Hetta fekk tó ein bráðan enda, tá mest sum alt føroyska liðið raknaði við í senn. Brádliga dugdu eisini aðrir enn Rúni at smasja, hevingar komu upp í hæddina, har tær eiga at vera, og blokkurin fór knappliga at vinna fleiri av bóltunum framman fyri netið.

Framvegis gekk javnt á, men trýstið frá føroyingum viðførdi nú fleiri mistøk hjá mótstøðumonnunum, og tá teir so eisini framdu tvey av tí heldur óneyðuga slagnum, var leyst og liðugt hjá okkara.

Sigurin var tryggjaður uttan stórvegis hóvasták, og við hesum tykist nú vist, at Føroyar í øllum førum fara at røkka einum øðrum plássi í bólkinum. Um talan verður um meira, veldst helst um dystin móti Saaremaa, sum verður leiktur mikudagin.



Suni Juul Pedersen:

# Klárt til hálvfinalu

**Mest royndi leikarin á føroyska manslandsliðnum er vísur í, at Føroyar nú eru í hálvfinaluni, men dysturin móti Saaremaa skal tó helst vinnast**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

- Hetta var ein frálíkur dagur, helt ein av mest royndu spælarunum á føroyska flogbóltslandsliðnum, Suni Juul Pedersen, tá vit eftir sigurin á Cayman fingu orð á hann.

Við hesum sipaði hann sjálvandi til teir báðar sigrarnar, sum føroyska liðið hevði vunnið sunndagin, og sum at kalla hava tryggjað liðnum pláss í hálvfinaluni.

## Torførur dystur

Serstakliga var hann fegin um sigurin á Cayman. Ein sera torførur dystur, men tó ikki torførari, enn Suni hevði roknað við.

- Vit sóu teir spæla á Gotlandi, sum var fyrsta luttøkan hjá teimum, og tað var greitt, at teir høvdu nakað at byggja uppá. Teir høvdu tveir sera góðar smasharar, meðan hinir ikki vóru eins góðir, og spurningurin var so, um teir høvdu fingið fleiri av hasum slagnum. Tað høvdu teir tó ikki, men teir vóru kortini nakað sterkari nú, enn teir vóru á Gotlandi.

Í longum løtum av dystinum tóktist føroyska spælið ikki nóg agressivt, og Suni var sum so eisini samdur í hesum.

- Nei, vit vunnu ikki nóg nógv í blokkinum, og heldur ikki vunnu vit nóg nógv í álopinum, tá vit høvdu møguleika til tað.

Hóast tveir dystir innan ein dag er harður kostur, so helt hann ikki, at hetta hevði ávirkað negativt í so máta.

- Dysturin í morgun var rættiliga léttur, men tað, sum eg haldi gjørdi størsta skaðan var, at tað gekk so væl í fyrsta settinum nú. Vit fóru tá at taka okkum av løttum, og tað kanst tú ikki loyva tær í slíkum dysti.

## Hálvfinalan er heima

At tað so kortini eydnaðist at vinna, er sjálvandi nakað, sum Suni frøddist um.

- Nú skuldi vit verið í hálvfinaluni, tí burtur sæð frá dystinum móti Saaremaa, so eiga vit at vinna hini liðini í bólkinum við 3-0. Dysturin móti Saaremaa skal tó helst eisini vinnast, so vit fáa veikara liðið í hálvfinaluni, men tað fáa vit so at síggja, segði Suni Juul Pedersen at enda.